Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Verkhúsið Virkni

Verkhúsið Virkni søkir eftir pedagogi til farloyvisstarv við setan frá 1. apríl 2008 og eitt ár fram. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Verkhúsið Virkni er ein dagsstovnur har vit, í einum vælskipaðum pedagogiskum umhvørvi, geva kropsliga og sálarliga menningartarnaðum ítøkilig amboð til at menna sítt lívsvirði og sjálvsvirði.

Starvið er krevjandi bæði kropsliga og sálarliga, men er samstundis ein støðug pedagogisk avbjóðing.

**Vit vænta at tú:**

- tekur lut í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan
- sær týdningin av góðum samstarvi
- sjálvstøðugt kann seta ígongd og skipa fyri virksemi

Um tú spælir uppá eitthvørt ljóðføri, er tað av stórum áhuga hjá okkum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Hildur Hermansen, á telefon 28 91 00. Hevur tú hug og áræði at royna teg á einum virknum arbeiðsplássi, so send eina umsókn við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. til:

Nærverkið
Trivnaðartænastan
Postsmoga 26
110 Tórshavn
Stílað: Hermann Mortensen, virkandi deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 1. apríl 2008**

## Pedagogur til Bústovnin Eirargarð 16A/16BN

Bústovnurin Eirargarður 16A/16BN søkir eftir pedagogi til farloyvisstarv við setan frá 01.04.2008 til 31.03.2009, ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv, 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum. Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Eirargarði 16 A/BN
FO-100 Tórshavn
Stílað: Bjørg Mohr, leiðari

**Umsóknarfreist: 25. mars 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

ÍSRAEL oktober 2008




# Ísraelsferð

### í heystfrítíðini 8 - 20. okt. 2008

**Hvørt ár koma túsundtals kristin úr flestu heimsins londum saman á leyvsaluhátíðina í Jerusalem.**

Vit ferðast kring landið, síggja heilagu støðini og luttaka í leyvsaluhøgtíðini, sum verður hildin í eini veldugari høll í Jerusalem. Fyrilestrar verða hildnir um bíblisk evni. Stjórnarumboð og kendir persónar innan sang og tónleik luttaka.

Hugtakandi er løtan tá føroyingar saman við túsundtals øðrum útlendingum ganga skrúðgongu gjøgnum Jerusalems gøtur við tjóðarmerki sínum.

Føroyingar verða við í skrúðgonguni við føroyska flagginum á odda. Føroyar verða nevndar í hátalarum saman við hinum umboðandi londunum, meðan vit ganga gjøgnum gøturnar í Jerusalem.

***Mynd:** Føroyingar hava áður verið við í leyvsaluskrúðgongu í Jerusalem við føroyska flagginum.*



**Kostnaður:**
Ikki ásettur enn.

*Tekning fer fram hjá:*

**Marner av Lofti**
tlf. 0045 98159183 / 0045 20659183
marner@nrdc.com

**Svenning av Lofti**
tlf. 312045 / 212045
lofti@post.olivant.fo



## Hús á Signabø 30 til sølu

Norðseturhús snið 85s, bygd 1988. Stykkið er um 650m².

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi, bussleið 4 steðgar tætt við.

Sí myndir og uppl. á www.spadar5.com/sethus
Tlf. 421419 ella 271441 eftir kl 16

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!